## Makrelprísurin upp

Prísurin á makreli bleiv ikki so vánaligur, sum útlitini bendu á fyri fjúrtan døgum síðani, sjálvt um hann ikki er so góður sum um hesa tíðina í fjør, tá hann var umleið13 krónur í meðal.. Í síðstu viku kom prísurin upp í 9,70 krónur, og tað er líkt til, at hann fer longri upp. Tá Tróndur í Gøtu landaði 395 tons í Peterhead í Skotlandi mánadagin, fingu teir 10,20 krónur fyri kilo. Sama dag landaði Jupiter 550 tons í Måløy í Noregi.



## Berjadagur

Árið í ár hevur verið sjáldsama gott berjaár, og mong hava nýtt høvi at fara út í náttúruna at henta ber. Í Svínoy er einasti beraldarberjaskógur í Føroyum, og haðani fræ ttist, at runnarnir bera ber í ár. Tí hevur gongubólkurin hjá Felagnum Tórshavn gjørt av at fara til Svínoyar sunnudagin. Farið verður frá Kunningarstovuni kl. 10, og tey koma aftur til Havnar kl. 21 við leigaðum farti. Kostnaðurin er um 400 krónur.

# Stuðla skúla í India

**Ein av teimum verkætlanum, sum fær hjálp frá skótahjálpini 2006 er ein skúli á einum barnaheimi í India, sum Lisbeth Mortensen úr Havn skal vera við til at stovna**



*Umleið 700 børn ganga á skúlanum, sum er í bygdini nú. Tríggir lærarar eru á skúlanum*

*Mynd: Lisbeth Mortensen*

SKÓTAHJÁLP
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Listakvinnan Lisbeth Mortensen úr Havn skal vera við til at stovna ein skúla á gentuheiminum Santibari í indisku bygdini Ramburhat. Ein triðingur av teimum pengunum, sum skótar í Føroyum savna inn í skótahjálpini 2006 fara til hesa verkætlan.

- Frammanundan er bert ein skúli í bygdini. Har ganga umleið 700 børn og har eru bara tríggir lærarar, sigur Lisbeth Mortensen.

- Børn úr umleið 40 smábygdum ganga á hesum skúlanum, og fleiri av teimum noyðast at ganga ímillum 2 og 4 tímar fyri at koma í skúla. Tað er heilt vanligt í India, at børn noyðast at ganga so langt fyri at koma í skúla, greiðir hon frá.

Skúlin, sum Lisbeth verður við at seta á stovn, skal byrja í hølum hjá barnaheiminum, men tey vóna við tíðini at fáa ráð til at byggja ein nýggjan skúlabygning. At byrja við verður skúlin fyri umleið 50-100 børn í 1. og 2. flokki.

Skúlin verður bæði fyri tær genturnar, sum búgva á barnaheiminum og fyri onnur børn, sum búgva í bygdini.

- Vanliga hava foreldur ikki ráð til at lata meir eitt barn ganga í skúla, tí tey noyðast sjálvi at gjalda fyri skúlagongdina. Men tey, ið koma at ganga á hesum skúlanum skulu ikki gjalda nakað, greiðir Lisbeth frá.

### Eitt kall

Áhugan fyri India fekk Lisbeth, tí hon hevur verið faddur hjá tveimum gentum ígjøgnum International Børnehjælp, har hon hevur stuðla teimum við pengum til skúlagongd, mat og klæðir. Í januar í 2004 fór Lisbeth til India at vitja hesar genturnar. Tá kom áhugin fyri India á fyrsta sinni, og hon vildi fegin hjálpa hesum børnunum.

- Eg føli, at tað er hetta, eg skal gera. Eg føli at eg kann gera nakað fyri at hjálpa teimum. Man kann næstan siga, at tað er eitt kall, greiðir Lisbeth frá.

- Eg havi serliga ilt av, at hesi børnini ikki sleppa at ganga í skúla, tí uttan nakra skúlagongd, so koma tey aldrin víðari.

Fyri einum ári síðan fór Lisbeth til Suðurindia og var har í fimm mánaðir. Hon hevði fingið stuðul frá International Børnehjælp, og nýtti pengarnar til at gera eitt venjingarrúm á einum barnaheimi fyri menningartarnaðum børnum.

Á hesi ferðini var hon eisini ein túr har norðuri í landinum, millum annað vitjaði hon á Santibari barnaheiminum. Leiðarin á barnaheiminum greiddi frá ynskinum at fáa ein skúla, og tey avgjørdu saman, at seta ein skúla á stovn.

### Byrja beinanvegin

Pengarnir, ið koma inn við skótahjálpini, skulu brúkast til at innrætta og mála skúlahølini fyri. Harafturat skulu innbúgv, bøkur, skúlauniformar og viftur undir loftið keypast.

Tríggir lærarar skulu vera á skúlanum. Ein læraraløn í India er millum 150 – 250 kr. um mánaðin, og næsta uppgávan hjá Lisbeth verður at finna pengar til teirra lønir.

- Eg skal skaffa 1000 kr. um mánaðin framyvir. Av teimum pengunum fáa lærararnir 250 kr. hvør. Børnini fara at fáa mat á skúlanum, og tær síðstu 250 krónurnar eru nóg mikið til at keypa mat til øll børnini í ein heilan mánað.

Ætlandi fer arbeiði við skúlanum, í gongd so skjótt sum skótahjálpin er liðug. Lisbeth Mortensen fer til India fyrst í komandi ári, og ætlar at vera har í tveir ella tríggjar mánaðir. Har skal hon fylgja við hvussu arbeiði gongur og skal vera við til at keypa inn og til at innrætta og mála hølini.

- Eg fari at mála barnamálningar á veggirnar, tað er rættiliga óvanligt í India, tí har eru tey bara von við hvíttmálaðar veggir, greiðir Lisbeth frá.



*Lisbeth Mortensen, í miðjuni, saman við nøkrum av børnunum á Santibari barnaheiminum*

*Mynd: Lisbeth Mortensen*

## 23. árið við skótahjálp

**Leygardagin byrjar skótahjálpin 2006. Hetta er 23. ár á rað við skótahjálp í Føroyum, og í eina viku fara umleið 1000 skótar at ganga hús úr húsi at hjálpa fólki og savna pengar inn**

SKÓTAHJÁLP
*Ella Larsen*
*ella@sosialurin.fo*

Teir pengar ið skótarnir savna inn vera býttir í tríggjar partar. Ein partur fer til eina føroyska verkætlan. Í ár stuðlar skótahjálpin Ælaboganum, orkestri teirra menningartarnaðu. Ein partur fer til eina verkætlan, sum hjálpir børnum uttanlands. Tann verkætlan skal á onkran hátt hava tilknýti til ein føroying, so skótahjálpin kann frætta aftur frá verkætlanini og tryggja, at pengarnir koma á rætta stað og verða brúktir rætt. Í ár fara pengarnir til útlendsku verkætlanina til ein skúla í eini indiskari bygd, sum føroyska listakvinnan Lisbeth Mortensen verður við til at seta á stovn.

Tann triði parturin av pengunum fer í ein hjálpargrunn, har pengar kunnu latast úr, tá onkur vanlukka hendir. Seinast pengar vóru brúktir úr grunninum, var til at stuðla ofrunum av flóðalduni í Teilandi.

Í ár er gjørt meir enn vanligt burturúr at greiða skótunum frá, hvat pengarnir teir savna inn fara til. Vanliga vera upplýsingar sendir út til skótaliðini, men í ár hava tey frá skótahjálpini verið og vitja ymisk skótalið, fyri at greiða frá um skótahjálpina. Lisbeth Mortensen vísti myndir úr India og greiddi frá um skúlaverkætlanina. Ælabogin spældi tónleik fyri skótunum, og Jan á Argjaboða, úr nevndini fyri skótahjálpina, greiddi skótunum frá um sjálva skótahjálpina.

Jan á Argjaboða vónar, at tað kann gera innsavningina størri, tá tey geva skótunum meira vitan um, hvar pengarnir teir savna fara, og hvørjum tað er teir hjálpa.

Samstundis er skótahjálpin í ár flutt, so hon liggur eitt sindur seinni um árið. Hetta var fyri at skótarnir kundu koma í gongd við virksemi, áðrenn skótahjálpin byrjar.

Tey undanfarnu 22 árini hava skótarnir í miðal innsavnað 120.000 kr. og metið var sett í 1984, tá skótarnir savnaðu 184.758 kr. Til samans hava skótarnir hesi árini savnað 2,64 milliónir krónur inn til vælgerandi endamál.

Skótahjálpin 2006 endar leygarkvøldið 28. oktober.